Fylgiskjal 27

**Almannamálaráðið** Tórshavn 16.01.2020

**Hoyringsskriv í samband við uppskot um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin. ( tvingsilslógin).**

Heilsuhjálparafelag Føroya hevur fingið omanfyri nevnda lógaruppskot til hoyringar, og hava vit hesar viðmerkingar:

§4. Heilsuhjálparafelag Føroya fegnast um broytta tekstin viðvíkjandi tvingsilsnevnd, tó hava vit hesar viðmerkingar til uppskotið:

Tvingsilslógin leggur upp til víttfevndar møguleikar hjá starvsfólkum, mótvegis borgarum at brúka tvingsil. Orsaka av hesum meta vit, at tað er alneyðugt, at góðkenningar, ið tvingsilnevndin gevur, verða eftirmettar við jøvnum millumbilum, og tiknar av beinanvegin støðan hjá viðkomandi borgara broytist.

Soleiðis sum vit lesa uppskotið, kunnu avgerðir hjá tvingsilsnevndini ikki kærast til annan myndugleika, meðan avgerðir hjá starvsfólkum kunnu kærast til tvingsilsnevndina, hetta ger, at borgarar mugu verða vísir í, at rættartrygdin er í lagi, og at gjøgnumskygni er í øllum arbeiðinum hjá tvingsilsnevndini, og fegnast vit tí um, at fasti limurin í nevndini skal vera royndur løgfrøðingur.

At enda vilja vit vísa til grein 1 í ST sáttmálanum fyri einstaklingar, ið bera brek, ið sigur: Endamálið við hesum sáttmála er at fremja, verja og tryggja fólki, ið bera brek, øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi fullvegis og javnbjóðis, og fremja virðingina fyri teirra viðføddu tign.

Fólk, ið bera brek, fevna um tey, sum hava varandi likamlig, sálarlig, vitborin og kenslulig mein, sum í samvirki við ymsar forðingar kunnu forða fyri, at tey til fulnar og á virknan hátt kunnu vera í samfelagnum á jøvnum føti við onnur.

Hetta eru ásetingar, ið landsstýrismaðurin eigur at hava í huga, í samband við ásetingarnar í lógini, og skipa so fyri, at hesir borgarar ikki koma í verri støðu enn teir longu eru í.

Vinarligar heilsanir

***Heilsuhjálparafelag Føroya***

Mary Antonsdóttir, forkvinna

Ása Olsen, fyrisitingarleiðari

*Fr. Petersensgøta 7 · FO-100 Tórshavn*
*Telefon 317725 · Fax 319117 · email: hhff@hhff.fo · heimasíða.: www.hhff.fo*